## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen greiðir frá um veðrið




**Veðrið í morgin:**
Gul til stívt andøvsgul av landnyrðingi og yvirhøvur turt og sólglottar. Seinnapartin veksur hann vindin upp í ein strúk av landsynningi og um kvøldið regn. Hitin millum 8 og 11 stig.




**Veðrið hósdagin:**
Stívt andøvsgul upp í hvassan vind av landsynningi, seinnapartin snarar hann í útsynning. Ælingur, men onkur sólglotti og hitin millum 10 og 13 stig,




**Veðrið fríggjadagin:**
Andøvsgul upp í ein strúk av útsynningi og sólglottar, men eisini okkurt ælið. Hitin millum 10 og 13 stig.

**Veðrið leygardagin og sunnudagin:**
Leygardagin veksur hann vindin upp í hvassan vind av landsynningi og regn. Sunnudagin nakað minni vindur av útsynningi og ælingur. Hitin millum 9 og 13 stig.

# Móttøka fyri svimjarum í Vági



**Tá world-Cup svimjararnir úr SuSvim komu til Suðuroyar mánakvøldið, var skipað fyri móttøku**

SVIMJING
*Dagfinn Olsen*
*dagfinn@sosialurin.fo*

Eftir góðu úrslitini hjá Pál Joensen og hinum svimjarunum í SuSvim í Berlin, var móttøka, tá hesir komu aftur til Suðuroyar í gjárkvøldið. Í Havn var móttøka fyri øllum luttakandi svimjarunum í ferðalagnum, men í Suðuroynni heiðraðu suðuroyingar svimjarunum í SuSvim.

Fyrst varð skipað fyri ymsum á Krambatanga, tá Smyril kom, og so varð farið til Vágs í Vilt-húsið á Marknoyri.

Marlon Kjærbo handaði vegna nevndina í SuSvim svimjarunum blómur og Pól Poulsen helt røðu. Eisini fingu Jón Bjarnasson, venjari, og Turið Kjærbo, physioterapeutur og mamma Pál Joensen, blómur. Eyðdis Kjærbo handaði blómur vegna Vágs Kommunu, og segði nøkur orð. Eisini hevði Jón Bjarnason, venjari, orðið.

Hann minti á, at úrslitini siga sítt, og at tað í veruleikanum "bert" eru ellivu pláss eftir á stigaum at vinna, tí bert ellivu persónar í heiminum hava svomið skjótari enn Pál Joensen. Hann var ivaleysur í, at møguleiki er at klintra upp eftir stiganum, og hann takkaði teimum, ið so støðugt vísa vælvild og stuðla, og dreymin um ein 50 metra hyl í Vági hevur Jón ikki slept enn. Hann segði seg ivast í, um fólk gjørdu sær greitt, hvussu stórt bragd Pál í veruleikanum hevur framt, tí eitt tíðindafólk hevði júst spurt Jón, um hann metti, at Pál var komin upp á sama støði, sum føroysku landsliðsfótbóltsleikararnir, og hendan samanburð metti Jón vera heldur láturligan.

Onnur høvdu eisini orðið og fólk heilsaðu svimjarunum. Nógv fólk varð komið saman á Marknoyri, har kaffi og hugni saman við óføru svimjarunum á loftinum í gomlu handilshúsunum, setti alt í størri samanhang. Heimurin og nærumhvørvið sameintust í hesi løtu. Sum Jón Bjarnason tók til: einum nýtist ikki at koma úr einum milliónbýi, fyri at teljast millum heimsins bestu!

### Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | -14 |
| Nuuk | -6 |
| Qaqortoq | 0 |
| Ammassalik | 4 |
| Saint John's | -- |
| Halifax | -- |
| Reykjavík | 6 |
| Seyðisfjørður | 5 |
| Tórshavn | 8 |
| Lerwick | 7 |
| Aberdeen | 9 |
| London | 1 |
| Tromsø | -- |
| Bergen | 4 |
| Oslo | -- |
| Stokkhólm | 2 |
| Keypmannah. | 5 |
| Helsinki | -3 |
| Moskva | 6 |
| Berlin | 9 |
| Warzawa | 3 |
| Kiev | 5 |
| Bukarest | 5 |
| Paris | 12 |
| Madrid | 14 |
| Róm | 16 |
| Malorca | 20 |
| Athen | 17 |
| Malta | 17 |
| Tunis | 20 |
| Beijing | 4 |
| New Dehli | 20 |
| Bangkok | 33 |
| Jakarta | 33 |
| Sydney | -- |
| New York | 10 |
| Miami | 22 |
| Los Angeles | 18 |
| Meksikobýur | 17 |
| Panama | 24 |
| La Paz | 15 |
| Rio de Janeiro | -- |
| Buenos Aires | 28 |

## LUFTTRÝSTIÐ

Síðstu nátt:




Komandi nátt:




**Síðsti nátt:**
Eitt lágtrýst, 981 hPa. eystan fyri Skotland fer spakuliga norðureftir.

**Komandi nátt:**
Lágtrýstið við Hetland stendur mestsum í stað og grynnist. Djúpa lágtrýstið yvir Atlantshavinum á 52N-37v fer í landnyrðing og brúgvalagið haðani verður væntandi við Føroyar mikukvøldið.

## HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 12/11 kl. 06⁰⁰ – 12/11 06⁰⁰. Hitin í gjár: 8,5°
Minsti hiti máldur í oktober: -4,0° -
Mesti hiti máldur í oktober: +18,4°

## AVFALLIÐ




Avfallið: 5,0 mm – mált frá 12/11 kl. 06⁰⁰ – 13/11 06⁰⁰.
Avfallið higartil í oktober: 55 mm

## VESTFALLSKYRRINDI

7. november Mánin næstur jørðini
16. november Tendring
22. november Mánin longst frá jørðini
24. november Fyrra kvarter

Kelda. Álmanakkin 2008

| Dagur | Suðuroyar-/ Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/ Sundalagnum fp. | sp. | Vestmanna-sundi fp. | sp. | Mykines-firði fp. | sp. | Nólsoyar-firði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvanna-sundi fp. | sp. | Fugloyar-firði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 17.nov | 06:29 | 18:55 | 05:29 | 17:55 | 05:44 | 18:10 | 08:29 | 20:55 | 09:29 | 21:55 | 04:44 | 17:10 | 03:44 | 16:10 | 06:44 | 19:10 | 07:44 | 20:10 | 06:14 | 18:40 | 07:29 | 19:55 |
| 18.nov | 07:20 | 19:46 | 06:20 | 18:46 | 06:35 | 19:01 | 09:20 | 21:46 | 10:20 | 22:46 | 05:35 | 18:01 | 04:35 | 17:01 | 07:35 | 20:01 | 08:35 | 21:01 | 07:05 | 19:31 | 08:20 | 20:46 |
| 19.nov | 08:11 | 20:37 | 07:11 | 19:37 | 07:26 | 19:52 | 10:11 | 22:37 | 11:11 | 23:37 | 06:26 | 18:52 | 05:26 | 17:52 | 08:26 | 20:52 | 09:26 | 21:52 | 07:56 | 20:22 | 09:11 | 21:37 |
| 20.nov | 09:02 | 21:27 | 08:02 | 20:27 | 08:17 | 20:42 | 11:02 | 23:27 | - | 12:02 | 07:17 | 19:42 | 06:17 | 18:42 | 09:17 | 21:42 | 10:17 | 22:42 | 08:47 | 21:12 | 10:02 | 22:27 |
| 21.nov | 09:50 | 22:14 | 08:50 | 21:14 | 09:05 | 21:29 | 11:50 | - | 00:27 | 12:50 | 08:05 | 20:29 | 07:05 | 19:29 | 10:05 | 22:29 | 11:05 | 23:29 | 09:35 | 21:59 | 10:50 | 23:14 |




javni
– Virkin og virðismikil
www.javni.fo